Leygardagin: Barnamøti kl. 14
Leygarkvøldið: Møti í Samljóð v/ Viggo Vilhelmsen kl. 19
Sunnudagin: Morgunmøti í Samljóð v/ Viggo Vilhelmsen kl. 11
Sunnukvøldið: Møti í Samljóð v/ Viggo Vilhelmsen kl. 19

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20 bíbliutími Op. 14,1-11. Hósdagin kl. 19.30 bindimøti. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Einki møti um kvøldi vegna møti á Oyrabakka.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Týskvøldið kl. 20 verður bíbliutími og bønarløta. Sunnudagin 27. apríl kl. 18.00: Møti, Símun Jacbsen

**Frelsunarherurin, Vágur**
Týsmorgun kl 9.30: orðið á borðið.
Mikudagin kl 20.00: heimaforbundið

**Meinigheitshúsið, Vágur**
Týsdagin kl. 20.00 Bíbliutími og bønarmøti.

**Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag (KLH)**
Aðalfundurin hjá Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag, KLH, verður í Hoyvíkar kirkju Kristi himmalsferðardag 01. mai 2008 kl. 14.30.
KLH er ópolitiskt og hevur til endamál at virka fyri kristiligum sendingum í almenna Kringvarpinum og at styðja útvarpið og sjónvarpið í góðum og sømiligum sendingum. KLH vil forða fyri, at útvarpið og sjónvarpið verða nýtt til ósømiligar sendingar og annað, sum ikki er kristnum siði og kristnari trúgv verdugt.
Í sambandi við aðalfundin verður umrøða og orðaskifti um hugburð og virðir í barna- og ungdómssendingunum í Kringvarpinum.
Tað ber til at tekna seg sum lim á aðalfundinum.
Í sambandi við aðalfundin, verður eisini alment møti í kirkju- og missiónshúsinum á Argjum kl. 19.00. Argjakórið syngur. Øll eru vælkomin.

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
*Opið er mánadag til fríggjadag kl. 10.00 – 17.00*
*Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
Mánadagur 10.00 – 10.30 Fimleikur Grete Ellingsgaard
10.00 – 12.00 Ymiskt handarbeiði, Signy og Marita
14.00 – 16.00 Ymiskt handarbeiði, Signy og Marita
14.00 - 17.00 Kortspæl o.o. spøl
Kunningafólk til ferðafólkini, ið koma við ferðamannaskipunum í juni – sept. Mðr.
Meiri fast at vita á tlf. 215098/316491, Katrina í Geil, verkætlanarskipari
Týsdagur 09.00 - 10.30 Tekstviðgerð (lítið royndir brúkarar)Páll Poulsen
10.30 – 12.00 Tekstviðgerð (royndir brúkarar ) Páll Poulsen
10.00 – 11.30 Vit syngja, Benny og Flemming Samuelsen
Øll eru hjartaliga vælkomin
15.00 Opið hús
Øll eru hjartaliga vælkomin
Mikudagur 09.00 - 12.00 Maskinbinding v/Maritu Guttesen
10.00 - 12.00 Veving v/ Joanu Bjarnastein
10.00 - 12.00 Bindiklubbur
Øll eru hjartaliga vælkomin
15.00 Túrur: Við bussi út í Marknagil, Randi/Elisabeth, fysioperapeutar
Hósdagur 10.00 – 10.30 Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
11.00 Lesibólkurin: Vit lesa : "Tema við slankum" Sólrun Michelsen
Hittast hósdagin 24.apríl 14.00 – 16.00 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
Fríggjadagur, Flaggdagur: Stongt
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
hevur opið mánadag og týsdag frá kl. 13-17 og hósdag frá kl. 10-17.

**Dagtilhaldið í Gøtubrá tlf 441662.**
Opið týsdag og hósdag kl. 15-18.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Dagtilhaldið Blákollan á Oyri og er fyri allar eldri í Sunda Kommunu. Opið er hvønn týsdag og hósdag frá kl. 14.00 til 18.00.
Ymiskt ítriv, smíð og teldufrálæra v.m.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
tlf. 737795.
Opið er týsdag, mikudag og hósdag, kl. 15 til 18.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.
***Opið mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 18.00. Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.***
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17.
Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.
***Mánadagin 21. apríl***
verða Fríðvør og Eilen frá Aloa Vera og tosa um húðrøkt.
***Mikudagin 23. apríl***
heldur Hanna á Reynatúgvu, ergoterapeutur fyrilestur um hjálpartól í mun til dagligan førleika. Eisini vegleiðir Hanna í andlitsfimleiki. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl 15 - 18.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur: dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur: heilaf@post.olivant.fo

**Kunningarstovan, Felagið Tórshavn**
Vaglið 4, Postboks 379, 110 Tórshavn.
tlf. 302425
torsinfo@torshavn.foa
www.visittorshavn.fo
Opið er má-fr kl. 11-17, ley kl. 10-13.

**Sandoyar Kunningarstova**
*FO-210 Sandur*
*Tlf. 361836*
*www.visitsandoy.fo*

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
Rúslinjan hjá Bláa Krossi, tlf. 318586, svarar fríggja-, leygar- og sunnukvøld kl. 20 - 24.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Leygardag: kl. 22.30-23.30 AA-fundur.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundir - (Big book meeting)**
Týsdag: kl. 20.00 Stóri bókafundur er hvørt týskvøld í Losjuni á Tinghúsvegi 18. Inngongd frá Bøkjarabrekku.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og týskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundir í Vestmanna**
Í Skótahúsunum
Hósdag kl. 20 AA-fundur.
Sunnudag kl. 17 AA-fundur (opin fundur).

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
fundur fyri avvarðandi at alkaholikkara er hvørt týskvøld kl. 21, á Mýruvegi 22.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvønn mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum**
hevur hesi telefon nr.:
form. 313484 - 219584
næstform. 421092 - 281179
nevndarl. 319588 - 212839.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**Djóraverndarfelagið, tlf. 504533**
*postsmoga 1365, Tórshavn.*
dvf@dvf.fo

**HUFF, Hundaeigarafelag Føroya**
*limur í Dansk Kennelklub, kreds 12.*
Telefonin hjá felagnum er: 277317. Til ber at tekna seg sum lim og spyrja um eitthvørt viðv. hundum. Hvørt týskvøld kl. 19.00 ganga vit túr, møtast við Skógrøkt Landsins.

**80 ára føðingardagur**
Leygardagin 26. apríl verður Nicolina Jensen Beder 80 ár. Dagurin verður hildin í AB-húsinum frá kl. 11-15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 26. apríl hava hjúnini Marna (fødd Vandsdal) & Leivur Dorup Hilbert Egholm, Hvalvík, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin saman við systkjum og børnum v/ familju á Hotel Tórshavn. Frá kl. 19.00 verður opið hús í Missiónshúsinum í Hvalvík til ein drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.



Sunnudagin 8. juni hava Sanna og Ivan Johannesen í Miðvági gullbrúdleyp. Leygardagin 3. mai verður dagurin hildin í heiminum. Øll eru vælkomin frá kl. 15.00

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 14. mai 2008 hava Dorit og Kjartan S. Jensen, Oyri, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Eydnuni á Oyrarbakka leygardagin 17. mai kl. 18.30. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum verða biðin at siga frá í seinasta lagi 4. mai á tlf. 422283 ella 224605.

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 14. mai hava Gunnvá og Bjarki Magnussen, Húsavík, silvurbrúdleyp. Veitslan verður hildin á Keldu í Skálavík leygardagin 17. mai kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 7. mai á tlf. 361371 ella 280371.

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 7. mai 2008 hava Andrea og Jónsvein Eliassen, Leirvík silvurbrúdleyp. Dagurin verðu rhildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 10. mai kl. 19.00. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá, áðrenn 4. mai á tlf. 443231 ella 273099.

**Konfirmatiónir í Danmark**
Sunnudagin 27. apríl verður Vernar Hentze úr Skopun, sonur Poul Johan Danielsen og Mariu Hentze, konfirmeraður í Hirtshals kirkju.
Adr. er Kornvænget 21, Uggerby, 9800 Hjørring.



Hendan fitta genta verður konfirmerað í Langenæs Kirke í Aarhus sunnudagin 27. apríl kl. 10.00. Aftaná eru øll hjartaliga vælkomin heim á Langenæs Allé 68, kl. tv., 8000 Aarhus C til ein góðan bita.

**Prógv**
17. apríl tók Maria Hentze úr Skopun prógv sum heilsuhjálpari.

**Giktafelag Føroya**
**MBF-húsið**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13.00 til 16.00.

**Cøliakifelag Føroya**
Formaður er Henning Sørensen, Garðsgøta 3, Argir, tlf. 314783.

**Hjartafelagið**
Postboks 3120, 110 Tórshavn
e-mail: hjarta@hjartafelag.fo

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið: Súnfríð 316167, Ella 316261, Daisy 312498, Paulina 510677, Henry 272800.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.